BYGGIHARRARÁÐGEVI TIL TINGANES – ÚTBOÐ

Spurningar og svar

- **Kan helhedsplan, prioriterede projekter, tilstandsgrundlag og relevante frednings- eller bevaringsbestemmelser udleveres?**

  Tað verður ikki veitt í hesi fasu.

- **Omfatter de cirka 3 mio. kr. rådgiverhonorar og MVG?**

  Tær 3 mió. umfata allar útreiðslur, sum er øll sløg av ráðgevarasamsýningum, handverkaraútreiðslum, tilfarsveitingum o.a.

- **Hvilket forventet timeforbrug og fremmøde skal bemandingen kunne dække?**

  Tímanýtsla og uppmøting á staðnum, valdast ítøkiligu uppgávuna.

- **Hvordan ønskes ferie og sygdom håndteret?**

  Um sjúka kemur fyri ella feria er, meðan eitthvørt arbeiði er í gongd, er tað ein fyrimunur um byggiharraráðgevi hevur avloysara at heita á.

- **Hvordan indgår øvrige omkostninger og eventuelle specialistpriser i evalueringen?**

  Hetta útboð snýr seg um byggiharraráðgeva fyri Tinganes. Aðrir kostnaðir verða í samráð við og eftir avtalu við løgmansskrivstovuna.

- **Accepteres dansk som tilbuds- og arbejdssprog når man forstår og kan læse Færøsk?**

  Tað er ikki útilokað at nýta danskt sum arbeiðsmál, men væntað verður, at viðkomandi skilir og dugir at lesa føroyskt, tí samskifti og tilfar í sambandi við uppgávuna vera á føroyskum.

  Sambært Løgtingslóg nr. 106 frá 15. november 1984 um útbjóðing v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021 skal útbjóðingartilfar vera á Føroyskum.

- **Ynskja tit so at fáa ein tímaprís til allar leiklutir, ella er møguligt at bjóða inn við ymiskum tímaprísum til ymiskar lyklapersónar?**

  Ynski er um EIN tímaprís.

- **Verkætlanarleiðslu og samskipan: Er tað byggileiðsla tit meina, sí Ydelsesbeskrivelse 2018, pkt. 7.1?**

  Við verkætlanarleiðslu og samskipan verður meint við yvirskipaða leiðslu og samskipan av verkætlanini vegna byggiharran í sambandi við tær í útboðsbrævinum nevndu uppgávurnar, herundir fyrireiking, planlegging og uppfylging av verkætlanunum. Byggileiðsla sambært YBL18, pkt. 7.1, er ikki sjálvvirkandi fevnd av hesum. Verður tørvur á byggileiðslu í einari ítøkiligari verkætlan, verður hetta ásett serstakt, sbr. YBB19, pkt. 7.53.

  (Stutt sagt er tað verkætlanarleiðsla, byggileiðsla og arkitektonisk ráðgeving, talan er um.)

- **2. Uppskot til arbeiðshátt og uppgávuloysn. Kunnu tit greiða nærri frá hvat tit meina, dømi?**
  Tað er tað, tilboðsgevi skal lýsa.
- **Lægsti tímaprísurin í frymlinum er 750 kr. Hvussu eru tit komnir fram til kr. 750,00?**
  Hetta er ein meting.